# NSÍ gott tak á B36

Í Gundadali plagar B36 vanliga at standa seg væl, men júst NSÍ hevur seinnu árini havt sera gott tak á árstalsfelagnum. Sæð burtur frá vitjanini í fjør vár, so skal B36 leita sær aftur til Tey bæði seinastu kappingarárini hevur NSÍ ikki tapt móti B36 í Gundadali, sum hinvegin hevur betra takið, um roknað verður sum heild seinasta tíggjuára-skeiðið.

# HB skal vaska sær

Tá HB í fjør tapti 1-0 í Fuglafirði, var hetta samstundis byrjanin til kreppulíknandi støðu í felagnum, har broyting í venjaratoyminum at enda gjørdist loysnin, sum felagið valdi.

Tí er einki at ivast í, at HB nú ætlar sær at vaska tann ósigurin av sær, og vanliga standa teir seg eisini væl í Fuglafirði, har júst tapið í fjør er teirra einasta seinastu 10 árini.

# ki



aðist tað at greiða javnleik ímóti NSÍ og Víkingi, sum nú teljast millum toppliðini. Síðani hevur KÍ tapt fýra ferðir, og tað hevur verið merkisvert, at klaksvíkingar ikki hava skorað mál í hesum uppgerðunum, hóast teir tvær ferðir síðstu løtuna hava verið fleiri á vøllinum.

- Tvær tær seinastu ferðirnar hava vit ikki megnað at spæla okkum til málmøguleikar. Allir vita, at avrikið á Svangaskarði var tað lakasta higartil í ár, og nú vænta vit, at tað fer at venda hinvegin, eru boðini úr Klaksvík.

Fleiri spælarar hava verið skaddir. Tað er greitt, at Arnold Joensen ikki verður tøkur sunnudagin, og hóast Allan Joensen hevur vant eitt sindur í hesi vikuni, so er tað rættiliga ivasamt, um hann verður partur av hópinum. Eli Simonsen varð skiftur inn á Toftum. Hann hevur í vikuni vant við fullari ferð, og tískil kann roknast við, at hann verður millum teir fyrstu ellivu.

Heðin á Lakjuni hevur verið skaddur í fleiri vikur. Í hesi vikuni hevur hann vant við fullari ferð, og alt bendir á, at Heðin verður á liðnum ímóti 07 Vestur.

Summarið nærkast, og veðrið hevur verið fínt í Klaksvík í hesi vikuni. Hitin hevur verið góður, men í KÍ er trupulleikin, at stigini fylgja ikki við. Um trý stig ikki koma til høldar seinnapartin sunnudagin, so verður illa vorðið!

# Dystir um vikuskiftið

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.05 | Víkingur-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 17.05 | AB-EB/S | Rúni Gaardbo |
| 17.05 | B36-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 17.05 | ÍF-HB | Eiler Rasmussen |
| 17.05 | KÍ-07 Vestur | Dagfinn Olsen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.05 | NSÍ-Skála | Høgni Hansen |
| 16.05 | HB-B71 | Rói Jacobsen |
| 16.05 | B68-Víkingur | Jón Kári í Brekkuni |
| 16.05 | TB-MB | Eiler Rasmussen |
| 16.05 | FC Hoyvík-VB/S | Bárður Mortensen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 17.05 | AB-ÍF | Jóhan Petur Michelsen |
| 17.05 | B36-Víkingur | Jónas Johannesen |
| 17.05 | B71-EB/S | Eugen Voda |
| 17.05 | Undri-KÍ | Pætur Albinus |
| 17.05 | 07 Vestur-TB | Jóhan M. Stenberg |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 17.05 | KÍ-Víkingur | Verner Hentze |
| 17.05 | Skála-B68/NSÍ | Alex Troleis |
| 17.05 | EB/S-AB | Vinjard Dam |

vodafone deildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 13 | 6 | 7 | 13 |
| 2 NSÍ | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 14 | 10 | 4 | 11 |
| 3 B36 | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 10 | 9 | 1 | 11 |
| 4 Víkingur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 13 | 9 | 4 | 10 |
| 5 EB/S | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 6 | 4 | 10 |
| 6 B68 | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 11 | -3 | 7 |
| 7 AB | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 7 |
| 8 ÍF | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 7 |
| 9 07 Vestur | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 11 | 17 | -6 | 5 |
| 10 KÍ | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 3 | 8 | -5 | 2 |

**1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 13 | 10 | 3 | 14 |
| 2 B71 | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 15 | 7 | 8 | 13 |
| 3 HB | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 15 | 9 | 6 | 13 |
| 4 VB/S | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 16 | 13 | 3 | 13 |
| 5 FC Hoyvík | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 9 | 8 | 1 | 13 |
| 6 B68 | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 17 | 9 | 8 | 12 |
| 7 NSÍ | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 13 | 15 | -2 | 10 |
| 8 Víkingur | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 4 | 6 | -2 | 6 |
| 9 Skála | 7 | 0 | - | 2 | - | 5 | 5 | 15 | -10 | 2 |
| 10 MB | 7 | 0 | - | 2 | - | 5 | 6 | 21 | -15 | 2 |